

Elsa Jacobsen:

# Trøllkonan sum gjørdist evangelistur

**Tað er aftur turkur, og nú byrjar at rilla undir kollveltingini. Men framvegis heldur ágangurin fram móti teimum kristnu. Á andaliga økinum gerst ein tann fremsti stuðulin ein fyrrverandi trøllkona**



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

**10. partur**

## Atsóknir í Konso og Awasa

Eg havi verið á vitjan í Konso úr Yirgalem, har eg nú arbeiði. Í Konso eru forboð sett prestum og evangelistum at fara út í bygdirnar at samla fólk um Guds orð.

Á klinikkini í Konso hevur verið serliga strævið hesa tíðina. Meslingar hava gingið. Fleiri túsund fólk eru deyð. Tað varð mær sagt, at ein maður hevði mist øll børnini hjá sær, níggju í tali, og eisini konuna av meslingum ella av eftirsjúku. Her er sama støða við meslingum, sum tað var í Føroyum fyrr. Vandin er, tá ið fólk ikki hava havt meslingar sum børn, og tey verða smittað.

Yvirvøldin hevur nú tikið Tabor Semenary bíbliu- og forstøðumannaskúlan í Awasa, sum er norðanfyri okkum. Luhersk Missionssamband bygdi skúlan fyri 17 árum síðani, og teir góvu hann til Mekane Yesus kirkjuna. Tað eru bert 4-5 ár síðan, at kirkjan fekk skúlan aftur.

Nakrar dagar seinni tóku teir eisini missiónsstøðina, sum hvítusunnumenn úr Svøríki hava bygt í Awasa, sum nú er landspartahøvuðsstaður. Har er stór og vøkur kirkja, verkstaður og skúli fyri jarn- og træsmíð og nógv hús afturat.

## Hátíðarhald fyri kollveltingina

Nú eru vit í 1984. Til heystar eru 10 ár síðani kollveltingina. Ætlanin er at hava stórt hátíðarhald um alt landið í hesum sambandi.

Fólk vórðu mánaðir frammanundan tikin út til skrúgongu til hátíðarhaldið, sum skaldi fara fram.

Ljósperur eru settar upp, og skulu tær brenna nátt sum dag alt til heystar. Her í Yirgalem var ravmagn, men hetta var eitt óneyðugt oysl. Ikki minst, tá ið hugsað verður um, at hungursneyð aftur stóð fyri durum.

## Aftur turkur í 1984

Á okkara leiðum hevur regnað væl, síðan eg kom higar, og alt er grønt og vakurt. So var ikki alla staðni, og nógva staðni var turkur við sama lag. Hungursneyðin var tí stór. Fólkinum tørvaði nógva hjálp við sama lag.

Hungursneyð var eisini aftur í Konso og øðrum pørtum av landinum. Hon var byrjað so smátt í 1982, men nú merktist hon rættuliga. Aftur gjørdist tað uppgávan hjá Mekane Yesus kirkjuni at hjálpa til at býta út neyðhjálp til fólkið.

Hesa ferð var ikki nakar keisari at geva skuldina. Tí var henda hungursneyðin eitt skot fyri bógvin hjá kommunistiska stýrinum. Hildið verður, at henda hungursneyðin kostaði eina hálva millión mannalív og hótti aðrar fimm milliónir við tí sama.

Yirgalem var væl fyri við regni, og vit merktu einki til hesa hungursneyðina.

## Evangelisturin Shamebo sigur frá

Hann sat her í stovuni, gamli evangelisturin Shamebo. Hetta er í Arba Minch í oktober 1987.



*Nógv var gjørt burtur úr at hátíðarhalda ársdagarnar fyri kollveltingina*

Á ungum árum hoyrdi hann um Jesus frá amerikanskum trúboðarum í Kambata landspartinum vestantil, har hann var føddur fyrst í øldini.

Hann hevði slitið seg upp sum evangelistur. Hann búði nú í Addis Abeba. Tveir dagar frammanundan var hann komin higar at vitja vinir og kenningar. Teir átti hann nógvar av, tí hann hevði virkað her í fleiri ár.

Hann kom at arbeiða fyri Norsk Luthersk Missionssamband. Shamebo upplivdi eina serliga hending, sum hann greiðir frá:

"Vit fóru til Garda í Gidole økinum at hava møti. Eg las og talaði Guds orð til teirra, og tey lurtaðu væl eftir. So segði eg teimum, at ætlanin var at koma regluliga at læra tey at lesa og at boða Guds orð. Eg spurdi so, um tey vildu taka ímóti boðskapinum.

Teir gomlu menninir fóru útum at tosa um hetta. Tá ið teir kom inn aftur var svarið: "Vit og forfedrar okkara hava tænt Satan, og vit ætla at halda áfram at ofra til tað stóra træið, sum stendur her uttanfyri. Tit kunnu læra børnini og tey ungu, men vit vilja halda áfram sum fyrr." So fóru teir út í myrkrið.



*Fólk standa í bíðirøð eftir mati undir hungursneyðini. Summi vóru so illa fyri, at tey duttu deyð niður, meðan tey bíðaðu.*

Tey ungu og børnini sótu eftir, og vit fóru nú at læra tey bókstavarøðina. Tá ið ein løta var farin hoyrdist eitt brak uttanfyri. Vit hvukku við og spurdu, hvat hetta var, men eingin visti, so hildu vit áfram við undirvísingini.

Ein løta gekk, so hoyrdist aftur eitt brak, harðari enn fyrru ferðina. Eg helt, at tað kanska var grót, sum rullaði oman brekkuna.